Talvið hesa vikuna

Zhang Zhong (2639) - Anand, V (2766)
GMA Wijk aan Zee (7. umfar), 18.01.2004

1.e4 c5 2.Rif3 e6 3.d3 (Lukkaði varianturin í sisilionskum) 3...b5 4.g3 Bb7 5.Bg2 d6 6.0—0 Rif6 7.Rig5 h6 8.Rih3 Ric6 9.f4 Be7 10.Be3 h5 11.Rif2 d5 12.e5 Rid7 13.c4 bxc4 14.dxc4 Rib6 15.Ria3 Rb8 16.Rid3 d4 17.Bd2 g6 18.b3 Kf8 (Antin rættiliga djúpt, ella eitt slag av bíðileiki. Torført er hjá svørtum at finna ætlanir, og møguliga bíðar Anand eftir hvítu ætlanini) 19.Ric2 Rid7 20.Fe2 Fc7 21.h3 Rid8 22.Rice1 Bxg2 23.Rixg2 Ke8 (Møguliga hevur Anand av fyrstan tíð ætla sær á g7 við konginum, men hevur mett at tað var ov vandamikið) 24.g4? (Fyrsti feilur hjá kinverjanum. Hví geva svørtum opnar linjur oman móti hvíta konginum?) 24...hxg4 25.hxg4 Fc6 26.Rf3 Fa6 27.Fd1 Ric6 28.Fc2 Kd8 29.Re1 Kc7 (Kongurin er tryggur, og svartur kann byrja at hugsa um kongaálop) 30.f5 (Ein alt ella einki leikur. Megnar hvítur at standa ímóti álopinum, er nógv vunnið) 30...gxf5 31.gxf5 Rbg8 32.fxe6 fxe6 33.Rf7 Kc8 34.Bf4 Bf8 35.Ff2?

DIAGRAM
Støðumynd eftir 35. Ff2

35...Rid8! Rókurin er fangaður 36.Rxd7 Kxd7 37.b4 Ke8 38.bxc5 Rh3 39.Fc2 Fc6 40.Re2 Bxc5 Og hvítur gavst. Hann hevur einki mótspæl. 0—1

Klaksvíkingar framum kollfirðingar

Eftir stórsigurin á sandavágsmonnum, hava klaksvíngar tikið leiðsluna í 1. deild. Fyrrverandi oddaliðið úr Kollfirði tapti óvæntað sín dyst um vikuskiftið

TALV
Carl Eli Nolsøe Samuelsen

Fer tað endiliga at eydnast sigursvanda klaksvíksliðnum at vinna FM-heitið í ár? Teir hava verið tætt við seinastu fýra árini, men hava hvørja ferð dumpað ímóti endanum av kappingini. Seinast teir vunnu, var í 1999, og fimm ár millum FM-heitini er alt ov nógv sað við klaksvíksbrillum.

Fýra umfør eru eftir og kunna teir nú sjálvir avgera lagnuna. Hálvtannað stig eru niður til kollfirðingar, men støðan millum liðini kann sjálvtsagt broytast; Kollfirðingar hava nevnliga møguleikar við stórmeistarastyrki seinastu umførini. GM Tiger Hillarp-Persson hevur leikt við nøkur umfør, og kenna vit kollfirðingar rætt, fara teir helst at gera sær dælt av trumfinum nú kappingarendin nærkast.

Torkil fall

Klaksvíksliðið var skert í dystinum ímóti sandavágsmonnum. Rani Nolsøe og Finnbjørn Vang saknaðust, men innskiftararnir Ingolf Gaard og Esbern Christiansen gjørdu sanniliga teirra skyldu.

Ólavur Simonsen, sum í fyrsta umfari tapti á Torkili, fekk sína hevnd sunnudagin. Við svarta fólkinum vann hann á formsterka Torkil Nielsen, sum undan hesum talvi manniliga hevur rikið fyrsta borð hjá vágamonnunum við eitt javnleiki móti GM Tiger og sum sagt sigurin á Ólavi. Ólavur er tí tann einasti, ið hevur megnað at steðgað føroysku fótbóltshetjuni á talvborðinum.

Úrslitið gjørdist ein ruddiligur 4-0 sigur til heimaliðið.

Endurreist hvalvíkslið

Hvalvíkingar vunnu tryggan 3-1 sigur á tí annars væl telvandi kollfjarðaliðnum. Rógvi W. Rasmussen var aftur við hvalvíkingum - eftir eina pausu seinastu umførini - og gjørdi hetta stóran mun. Sigurin sunnudagin móti Hans Kristian Simonsen prógvar, at Rógvi er ein telvari, ið skal takast í álvara. Møguliga telvar hann ikki eins nógv sum aðrir telvarar í topp 10 í Føroyum, men evnini hevur hann og íðin er hann sum fáur.

Hvalvíkingar vunnu dystin 3-1, og hava blandað seg eitt vet í oddastríðið. Tiger var ikki við í vikuskiftinum.

Heiðurligt úrslit

Sterka havnarliðið fekk ikki nógv burturúr ímóti skerda toftaliðnum, sum hinvegin kunna verða fegnir um stigini. Føroyameistararnir frá í fjør vunnu tepurt 2,5-1,5. Jens Kristian Hansen var ikki á toftaliðnum, og Olaf Berg fekk tí Wenzil Højgaard yvirav sær á fyrsta borði. Uppgerðina vann Olaf. Grand old man í føroyskari telving Justines Hansen, vann óvæntað á Haldur Suna Johansen.

Við hesum úrslitið er greitt, at havnarmenn neyvan kunnu hótta toppin. Teir eru á fjórða plássi aftanfyri hvalvíkingar, kollfirðingar og klaksvíkingar. Toftamenn hava við hesum heiðurliga úrsliti helst tryggjað sær sessin í 1. deild; Hálvtfimta stig eru niður til sandavágsmenn á aftasta plássi.

Anand á odda í Wijk aan Zee

Sjey av trettan umførum eru leikt í krútsterku kappingini í Wijk aan Zee, Holland. Javnt er í toppinum, men einsamallur fremstur er indarin Anand (2766) við 5 stigum. Kramnik (2777) og Adams (2720) hava 4,5 stig, meðan Leko (2722), Topalov (2735) og Svidler (2747) hava 4 stig. Serliga hava Shirov (2736) og Bareev (2714) skuffað við sínum 3 stigum hvør.

Í C-bólkinum í Wijk aan Zee, hevur 13 ára gamli norski unglingurin Magnus Carlsen (2484) ognað sær sín fyrsta GM-norm! Hann er framanundan yngsti norðurlendski altjóða meistari, og verður uttan iva eisini tann yngsti norðurlendski stórmeistarin. Magnus hevur 6 stig av 7 møguligum í sterka C-bólkinum, sum millum luttakararnar telur fleiri stórmeistarar.

1. deild - 6. umfar

Klaksvík	Sandavágur	4-0
Ólavur Simonsen	Torkil Nielsen	1-0
Tummas M. Anthoniussen	Bernhard Augustinussen	1-0
Ingolf Gaard	Sonni Nielsen	1-0
Esbern Christiansen	Jónfinn Thomsen	1-0
Toftir	Havnin	1,5-2,5
Wensil Højgaard	Olaf Berg	0-1
Helgi Joensen	Bogi Ziska	0-1
Justinus Hansen	Haldur Suni Johansen	1-0
Øssur Hansen	Herluf Hansen	0,5-0,5
Hvalvík	Kollafjørður	3-1
Rógvi W. Rasmussen	Hans Kristian Simonsen	1-0
Martin Brekká	Torbjørn Thomsen	0,5-0,5
Finnbjørn Zachariassen	Eyðálvur Johannesen	1-0
Sámal Christiansen	Grettir Djurhuus	0,5-0,5

Støðan

1. Klaksvík	17,5 stig
2. Kollafjørður	16,0
3. Hvalvík	13,0
4. Havnin	12,0
5. Toftir	9,0
6. Sandavágur	4,5

1. Deild kvinnur

	dystir	v	-	j	-	t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1 Stjørnan	2	2	-	0	-	0	356	273	83	15
2 VB	2	2	-	0	-	0	371	279	92	12
3 Neistin	1	1	-	0	-	0	340	289	51	10
4 VÍF	2	0	-	0	-	2	353	308	45	9
5 StÍF	1	0	-	0	-	1	296	343	-47	5
6 Søljan	1	0	-	0	-	1	238	319	-81	2
7 Kyndil	1	0	-	0	-	1	210	353	-143	1

Máltindurin:

Simona Dziugyte	Neistin	110	(18)
Aukse Vysniaskaite	VB	103	(23)
Ioana Rápa	VÍF	91	(21)
Nicoleta Radu	Søljan	82	(18)
Sóley Mikkelsen	VÍF	75	(19)
Katarina Stepanov	Stjørnan	72	(14)
Gurið Mortensen	VB	70	(6)
Daiva Tuomaite	VB	68	(12)
Annika Ljósstein	Stjørnan	68	(18)
Nikolina Eyðbjørnsdóttir	VÍF	67	
Milica Ergic	StÍF	66	(8)
Irina Rodevici	VÍF	64	
Joan M. Djordjevic	Stjørnan	58	(19)
Rannvá Augustinussen	VB	56	
Lina Andriulyte	Neistin	53	

VB-Kyndil 36-18 (17-10):

Væntaða sorlið

Sum tey flestu høvdu roknað við, so gjørdi VB bart, tá Kyndil var á vitjan sunnudagin

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk

Tað var einki stórvegis roks, tá Kyndil vitjaði VB um vikuskiftið. Sum eitt av liðunum, sum stríðast um FM-gullið, so varð roknað við, at VB ikki skuldu hava stórvegis trupulleikar av botnliðnum, Kyndli, og hesin spádómur vísti seg eisini at halda.

Eftir eina byrjan, har VB hevði yvirtakið, uttan tó at hótta við beinleiðis sorli, so fekk VB veruliga gongd á seinastu løtuna undan steðginum. Stoðan broyttist tá frá 11-8 til 17-10, og í seinna hálvleiki helt liðið bara fram í sama spori.

Spurningurin tóktist einamest at vera, hvussu stórur sigurin hjá VB skuldi verða, og ivaleyst høvdu leikararnir avtalað undan dystinum, at hann skuldi verða so stórur sum gjørligt. Við verandi tættleika í oddastríðnum er kanska ikki heilt óhugsandi, at oddastríðið verður avgjørt við málmuninum, og í so mata stendur VB nú heilt væl í tí. Spurningurin er, hvørt teir eisini megna at savna nóg nógv stig saman.

Dysturin í tølum

VB-Kyndil (36-18)
Málskjúttar
VB: Daiva Toumaite 12(3), Rannvá Augustinussen 8, Aukse Vysniaskaite 5, Gurið Mortensen 4, Margreth Augustinussen 2, Arnleyg Hjelm 2, Eyðdis Kjærbo 1, Leila Jespersen 1, Sólrun Krosslá 1
Kyndil: Ann-Mari Wang 6, Randi Wardum 5, Annika Thomsen 3, Linda Weihe 2, Ingrid Petersen 1, Hildur Mikkelsen 1
Brotskøst: VB 5
Útvísingar: Kyndil 1
Dómarar úr Tjaldri: Kári Hansen & Trygvi Mortensen

VALGREINAR

Lægri skattatrýst er lykilin til framburð

Ólavur Hansen
valevni Fólkafloksins í Norðstreymoy

Vit mugu lækka skattatrýstið, so uppsparingin og íløgurnar í samfelagnum økjast. Harvið kann Føroyar gerast besta landið at búgva í.

Góðu veljarar
Nú skulu tit aftur til valborðið, og velja fólk í løgtingið. Eg eri biðin um at stilla upp fyri Fólkaflokkin í Norðstreymi, og vil eg fegin virka fyri at fólkaflokspolitikkur verður førdur til gagns fyri øll, ikki bara í Norðstreymi, men í øllum Føroyum.

Sum politikari eigur tú at hugsa fram í tíðina og leggja langtíðarætlanir soleiðis, at tað uppvaksandi ættarliðið hevur trygg kor at liva undir. Føroyar mugu vera betri enn okkara grannalond at búgva í og ein fortreyt fyri hesum er eitt lágt og arbeiðsfremjandi skattatrýst.

Bruttoskatt og lægri skatt
Fólkaflokkurin hevur sum stevnu, at føra ein skynsaman figgjar og skattapolitikk. Fólkaflokkurin sigur at skatturin skal niður, tí við lægri skatti, tíma øll nógv betur at arbeiða. Tí ynskir Fólkaflokkurin at broyta skattaskipanina soleiðis, at vit fáa ein bruttoskatt. Vit skulu ikki gjalda meir enn 40 % í skatti av seinast tjentu krónu. Hetta ger so tað, at tað loysir seg betur at arbeiða, uppsparingin verður størri, og hugurin at gera nýggjar íløgur veksur.

Nýggjar íløgur eru neyðugar
Serliga innan fiskivinnu er neyðugt við íløgum, sum t.d. innan biotøkni, her kann fáast meiri burturúr fiskinum Um vágafúsur kapitalur var til at gera íløgur á hesum øki, kundu nógv nýggj arbeiðsplkáss veri skapt í hesum parti av fiskivinnuni.

Nýggjar íløgur eru eisini neyðugar innan orkuframleiðslu. Neyðugt verður at gera íløgur í aðrar orkuhættir enn vatnorku, sum t.d. alduorku og havstreymsorku. Føroysku sundini eru vælegnað til hetta.

Betri umstøður í ferðsluni
Myndstri í útflutninginum úr Føroyum í dag er soleiðis at mest sum allar fiskavørur vera koyrdar til høvuðsstaðin, og er hetta nakað sum vit í Norðstreymoy merkja hvønn dag. Allur útflutningur úr norðara og vestara parti av landinum kemur ígjøgnum Norðstreym, og skapar hetta eina øgiliga ferðslu í økinum. Eg vil virka fyri at ferðslan og umstøðurnar hesum viðvíkjandi vera so tryggar sum gjørligt, ikki bara í Norðstreymi, men líka úr Leirvík og Vestmanna til Havnar.

Ferðavinnan
Ferðavinnan er eisini ein vinna, sum gevur valuta til landið. Fólkaflokkurin vil, at ferðavinnan skal hava góð kor at arbeiða undir. Nógv fremmandafólk koma til Norðstreymoy vegna nátturuvakurleikan. Fólkaflokkurin vil vera við til at skapa møguleikar fyri at fólk í Norðstreymoy og runt landið kunnu gera íløgur innan ferðavinnuna teimum sjálvum at gagnið.

Lykilin til størri uppsparing og íløgur
Alt hetta gerst við einum lágum skattatrýsti, so uppsparingin verður størri, og fólk fáa hug at gera íløgur.

Far á val 20. januar og set kross við lista A
- Ábyrgd, álit og áræði

Fólkaheilsan

Bill Justinussen
valevni Miðfloksins í Eysturoy
Bill.teletech.fo

Nútíðarsamfelagið, har fleiri og fleiri arbeiðsplkáss krevja minni likamliga rørslu, og har børn sum heild eru minni í rørslu enn fyrr, samstundis sum matvanar og livivanar sum heild broytast, setir nýggj krøv til fólkaheilsupolitikk. Ikki tí, ongin miðvískur fólkaheilsupolitikkur hevur nakrantíð verið í Føroyum. Heilsupolitikkurin hevur mest snúð seg um at hjálpa, har skaðin er hendur.

Fólkaheilsupolitikkur snýr seg um at hugsa langskygt og eigur at byrja, har lívið byrjar við tí fyri eyga at økja um heilsu og lívsvirði alt lívið.

Tí havi eg lagt stóran dent á júst fólkaheilsuna í mínum arbeiði sum landsstýrismaður. At leggja miðvísar ætlanir fyri tey næstu 10 - 50 árini er ikki løtuverk, og valdi eg tí at nýta verandi valskeið, sum tíverri var avbrotið í ótíð, til at leggja hendan politikkin til rættis. Ætlanin hevur alla tíðina verið at reka hendan politikk á breiðum grundarlagi við undirtøku og ávirkan frá øllum flokkunum á tingi.

Higartil hava vit á familjuøkinum sett pening av til trivnaðarkanningar, sum eiga at vera grundarlagið undir málrættaðum átøkum. Hvussu eru rørsluvanarnir í dag, hvussu eru matvanarnir, eru vit nóg sunn ella eiga vit at gera broytingar í gerandisdegnum fyri ikki sum vaksin at verða rakt av eitt nú sukursjúku. Hvørjir vandar hótta heilsuna sum heild. Síðani skulu heilsuátøk og royndirnar av teimum saman við støðugum kanningum vera grundarlagið undir framtíðar heilsupolitikkinum.

Eitt átak, sum í ár skal setast í verk, er at gera eina royndarætlan við børnum í 1. til 3. flokki, har øll fáa ókeypis mjólk, frukt og grønmeti í eitt ávíst tíðarskeið. Til m.a. hetta er 1,7 mió. sett av á figgjarlógini. Ískt hevur familjupolitikkurin sum nýtt øki 2,4 mió. í figgjarlógaruppskotinum.

Eg fegnist um, at onkur av hinum flokkunum sýnir fólkaheilsupolitikkinum stóran ans, og serliga tí leistinum, sum Miðflokkurin vísir á, og letur hetta upp fyri samstarvi í komandi valskeiði.

Miðflokkurin fer framhaldandi at hava fólkaheilsuna á dagsskrá.

Ein sterkur Miðflokkur

Jan Højgård
valevni Miðfloksins í Esturoy

Vit minnast væl enn tann skelk, ið var millum okkara veikastu borgarar, tá ið landstýrismaðurin í almannamálum gjørdi av, at taka tey fáa oyru, tá tey høvdu møguleika at fáa pengar afturgoldnar í skatti, frá teimum. Hetta vóru pengar, ið tey høvdu goldið ov nógv. Tí má tað sigast at verða ognartøka. Eg fari at arbeiða fyri, at tey, ið eru ringast fyri ikki verða kanøfla av Almannastovuni.

Almennastovan er fyri at hjálpa fólki og kostar samfelagnum nógv. Mangan tykist tað sum ein verður hildin niðri av teimum. Tað er óheppi at ikki fólk við serkunleika kunnu taka sær av slíkum málum. Lati tey ringast fyri, fáa fri fyri forfylging frá almennari síðu.

Ein sterkur Miðflokkur er við til at tryggja rættin hjá tí einstaka.

Til allar veljarar í Føroyum og Suðurstreymoyar valdømi

Jónfinn Olsen
valevni Miðfloksins í Suðurstreymoy

Nú stundar aftur til eitt Løgtingsval, hesaferð í úrtíð. Men soleiðis skuldi tað nú verða, um vit eru samd ella ikki. So er valið útskrivað.

Eg havi valt at stilla uppaftur hesaferð, tí eg meti, tað vera av týðningi, at ung fólk eru við í politikki, og eisini tykist tað, sum at virðingin og moralurin er við at fara út av kós millum politikkarar, og vil eg tí bjóða meg fram og vita, um hetta er nakað, sum kann gerast nakað við, "ella um tað er satt, sum tað verður sagt, at øll broytast, tá komið verður inn um tinggátt"? Vónandi er tað ikki so?

Eg fari ikki at bjóða meg fram við fleiri vallyftum, "sum ofta verður gjørt av valevum", tí tey kann man mangan ikki halda, tá samgongan er skipað eftir eitt val, tað hava vit so mangan verið vitni til. Men hinvegin er onki galið í at siga tykkum, hvat eg vil virka fyri, um hesin møguleiki býðst mær.

Um tú ella tygum vilja stuðla mær at koma inn á Føroya Løgting

Vil eg millum annað virka fyri:

- Einari tryggari tjóðarfrælsisleið, bygd á tann Kristna grundvøllin.
- At ein figgjarlig uppgerð verður sett á dagsskránnað, sum vil lýsa fíggjarligu støðuna millum Føroyar og Danmark.
- At tað av Guði innsetta hjúnabandið, sum vit kenna í dag í samfelagi okkara, verður varðveitt, og lóg um skrásett parlag, ikki verður veruleiki.
- At verja familjurnar og børn teirra.
- At barnavørur gerast bíligari, enn tær eru í dag.
- At ófødda barni fær rættin til lívið eins og vit onnur, og arbeitt verður fram ímóti at minka um fosturtøkurnar.
- At verkamannafjøldin fær lægri skatt (sí grein eg havi skrivað í bløðunum).
- At hægri skattafríðar pensiónir verða veittar pensionistunum. Og at tey gomlu annars hava tað gott og trygt á ellisárum teirra.
- At oljuavgjaldið verður avtikið.
- At øll punktgjøld verða avtikin, og nýggj MVG-lóg verður gjørd.
- At korini fyri frælsu ítróttina skula betrast munandi.
- At alivinnan fær tey neyðugu korini at virka undir, so henda vinna kann fóta sær aftur og verða við til at geva fleiri pengar til okkara fólk (hetta er = arbeiðsplkáss), og fleiri pengar til landskassan, til gagns fyri okkum og samfelagið alt.

Sum sagt, fari eg ikki sum mangan verður gjørt til val av valevnum, at lova nakað undan einum vali, men eg kann álíkavæl siga tykkum, hvat eg ætli mær at virka fyri, um eg fái møguleikan.

Eg vóni, at hesi 12 punktini eru við til at geva tær nakað at hugsa um 20 januar 2004 valdagin, tá tú ella tygum fara á val at seta X tykkara.

Tað verður ofta spurt, hvussu figgja vit alt. Tað seinasta punkti hjá mær er ein møguleiki fyri at fáa tilvega fleiri pengar at figgja samfelagið við. Ein annar møguleiki kemur undan kavi, tá vit lækka skattatrýstið, tí tá fara fleiri pengar í umfar, allarhelst fleiri arbeiðsplkáss verða tá eisini skapt av hesi orsøk, so byrjar myllan at mala og ringvirkningarnir koma, og endar tað møguliga eisini við, at Landskassin so fær fleiri skattakrónir inn samanlagt enn higartil. "So vit hava fleiri møguleikar at royna enn".

Vóni at tú og tygum fara at hugsa um omanfyristandandi mál og velja rætt við at stuðla MIÐFLOKKINUM, ein persónlig atkvøða er tó ikki av vegnum.

MIÐFLOKKURIN TÍN RØDD Á LØGTINGI.